


**EITT SPÆL**

*Alt á Sláturmiðstøðini er skipað soleiðis, at tað skal ganga bæði skjótt og lætt. Tað at taka skinnið burturav, er eitt spæl í orðsins sanna týdning*



**SKAL KOYRA**

*– Eg plagi at hjálpa til her, sigur klaksvíkingurin Leon Sólheyg úr Klaksvík. - Eg ynski at hetta skal koyra*

## » Fólk vilja ikki hava ta stóru rúgvuna við sær aftur til húsa, men bert henda lítla smakkin av heystinum

# 1700

Virksemið á Sláturmiðstøðini í Haraldssundi byrjaði í 2007, men síðani tá hava fólk fingið eyguni upp fyri tænastu teirra.
Hetta fyrsta árið flettu teir slakar 1000 seyðir, men árið eftir so nógvar sum 1700. Hetta árið flettu og pakkaðu teir eisini 175 neyt.
Tá vit vitjaðu á virkinum í farnu viku, høvdu teir longu flett 400. Men sum ordrabókin sær út, er lítil ivi um, at teir fáa meiri enn nokk at gera hesa vikuna, ið skúlarnir eru í heystfrí.